**UTTAN ÚR HEIMI**

## Bara tímar eftir

Pakistansku trygdarmyndugleikarnir siga, at nú er tað bara ein spurningur um tímar, til yvirgangsleiðarin Osama bin Laden verður tikin.

- Vit eru komnir nógv nærri málinum. Herfyri var hann fleiri mánaðir undan okkum, síðani styttist tað til vikur, og nú tosa vit bara um tímar, segði ein týðandi yvirmaður hjá pakistansku fregnartænastuni í gjár.

Síðani pakistansku myndugleikarnir í samstarvi við CIA tóku Khalid Sheikh Mohammed næstseinasta leygardag, hava teir sett meiri ferð á arbeiðið at finna bin Laden á marknaleiðunum millum Pakistan og Afghanistan. Pakistansku myndugleikarnir hava sagt, at teir funnu fleiri týðandi skjøl í húsunum, har Khalid Sheikh Mohanmed varð tikin, men tað er ógreitt, um tað eru hesi skjølini, sum hava givið myndugleikunum upplýsingar um, hvar bin Laden kann vera staddur.

Bæði pakistanar og amerikanarar viðganga, at teir vita ikki, hvussu bin Laden sær út í dag, tí tað er væl hugsandi, at hann hevur broytt útsjónd fyri ikki at verða avdúkaður.

## Ætla at gera film um 11. september

Tveir indiskir filmsstjórar hava sett sær fyri at gera ein film um yvirgangsatsóknirnar í USA tann 11. september í 2001.

Annar filmsstjórin, Ujjal Chatterjee, sigur, at filmurin fær heitið "The Search", og at upptøkurnar byrjar einaferð í mai mánað. Fyrrverandi tíðindamaðurin Khalid Mohammad hevur skrivað handritið til filmin.

Høvuðsleikari í filminum verður Manisha Koirala. Maður hennara doyr í atsóknini at World Trade Center, og 10 ára gamli sonur teirra sær tey bæði tornini rapa á sjónvarpsskíggjanum. Filmurin snýr seg við øðrum orðum um eina indiska familju, sum verður rakt av vanlukkuni, og hvussu hon kemur fyri seg aftur.

## 58 ára gomul fekk tvíburðar

Tann 58 ára gamla Samira Elias fekk leygardagin tvíburðar, og hon er elsta svenska kvinnan, sum hevur átt barn.

Samira Elias og maðurin, sum bæði eru svensk, valdu, at hon skuldi eiga børnini í Ísrael, og leygardagin átti hon tvíburðarnar við keisaraskurði á sjúkrahúsinum í býnum Nahariya har norðuri í Ísrael. Annar tvíburðurin vigaði 2400 gram og hin 2200. Samira Elias eigur einki barn frammanundan. Hon gjørdist við barn eftir viðgerð á einum sjúkrahúsi á Kýpros.

Hóast hon er tann elsta svenska kvinnan, sum hevur átt barn, er hon ikki tann elsta í heiminum. Sambært metbókini hjá Guinness átti ein 63 ára gomul italsk kvinna ein son í 1994.

## Heimsins elsta kvinna deyð

Heimsins elsta kvinna, sum búði í Brasilia, er deyð. Hon var 124 ára gomul.

Tað almenna føðibrævið hjá Mariu Etelvinu Dos Santos sigur, at hon varð fødd tann 15. juli í 1878. Er hetta rætt, var hon eftir øllum at døma elsta kvinna í heiminum, nú hon doyði.

Maria Etelvina Dos Santos átti fimm ommubørn, 26 langommubørn, 39 oldurommubørn og fýra tippommubørn, skrivar týska tíðindastovan DPA úr Brasil.

# Bush og Blair undir trýsti



*Tað leikar hart á hjá George W. Bush, forseta í hesum døgum. Her tosar hann við spanska forsætisráðharran, Jose Maria Aznar, meðan Condoleezza Rice, trygdarráðgevi lurtar.*

**Russar hava boðað frá, at teir fara at siga "njet", og fransmenn hava boðað frá, at teir fara at siga "non". Tað leggur trýst á George W. Bush og Tony Blair um at geva vápnaeftirlitsmonnunum betri stundir.**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Diplomatiska virksemið á ST-høvuðsborgini í New York hevur verið stórt seinastu dagarnar og næturnar, og telefonlinjurnar hava verið heitar millum Washington og aðrar høvuðsstaðir kring heimin.

Mánakvøldið kunngjørdi franski forsetin, Jacques Chirac, at Frakland fer at nýta sýtingarrættin í trygdarráðnum ímóti tí seinasta Irak-uppskotinum, sum USA, Bretland og Spania hava lagt fram. Um somu tíð segði russiski uttanríkisráðharrin, Igor Ivanov, at Russland fer eisini at atkvøða ímóti og um neyðugt at nýta sýtingarrættin. Sambært Chirac skal Kina eisini vera til reiðar at nýta sama rætt.

Eygleiðarar siga, at hetta kann bera í sær, at Bush og Blair koma at standa eftir sum teir stóru tapararnir í einum leiki, sum ikki einans er eitt álvarssamt bakkast fyri amerikanskan og bretskan uttanríkispolitikk, men sum eisini kann ryggbróta ST sum tann stovnin, har altjóða avgerðir verða tiknar. Harafturat ivast eygleiðararnir ikki í, at hetta kann fáa avleiðingar fyri innanlands umdømið hjá bæði Bush og Blair.

Hesin prísur kann gerast ov høgur, sjálvt hjá George W. Bush, forseta, og í London eru eygleiðarar farnir at tosa um, at Blair skal vera sinnaður at góðtaka eina ella aðra neyðsemju. Eftir uppskotinum hjá USA, Bretlandi og Spania skal Irak verða avvápnað í seinasta lagi tann 17. mars, men í gjár ljóðaði í London, at Blair er til reiðar at útseta hesa freistina. Tað sama skal amerikanska stjórnin vera, men afturfyri vóna tey bæð londini so, at Russland, Kina og Frakland fara at sleppa avgerðini um at nýta sýtingarrættin. Hjá Blair ræður tað eisiin um at sissa sínar egnu floksfelagar, sum gerast altsamt harðligari í sínum atfinningum at forsætisráðharranum.

### Bert fýra fyri

Í USA siga eygleiðarar, at tað stendur einki frægari til hjá Bush enn hjá Blair. Misnøgdin við búskaparpolitikkin hjá forsetanum veksur dag frá degi, og fer USA í kríggj við Irak uttan góðkenning frá ST, kann tað gerast eitt politiskt sjálvmorð hjá forsetanum, siga eygleiðararnir. Samstundis veksur altjóða trýstið á forsetan um at útseta krígsætlanina ella at sleppa henni heilt.

USA skal hava níggju lond at atkvøða fyri uppskotinum í trygdarráðnum fyri at fáa meiriluta, men tað er sjálvandi treytað av, at einki land nýtir sýtingarrættin. Sum er kan Bush bara kenna seg vísan í at fáa fýra atkvøður. Tær eru frá USA, Bretlandi, Spania og Bulgaria. Fimm lond siga nei. Tey eru Russland, Kina, Frakland, Týskland og Sýrialand. Eftir eru Kili, Meksiko, Angola, Kamerun og Guinea, og seinastu dagarnar hava serliga amerikanarar og fransmenn roynt at fáa tey í part við sær.



*Ein hugsunarsamur Tony Blair. Ei undur í, tí altsamt fleiri av hansara egnu floksfeløgum venda honum bakið í Irak-spurninginum.*



# Uppmøtingin til aðalfundir alt ov vánalig

**Í nógv ár hevur verið vanligt, at arbeiðarafeløg lýsa til aðalfund og eykaaðalfund beint eftir, um aðalfundurin ikki er viðtøkuførur, tí ov fá fólk møta. - Tey fáu, sum møta á aðalfundi, tíma kanska ikki so væl at koma á ein fund aftrat, tá ið aðalfundurin ikki er viðtøkuførur; tí verða báðir fundirnir lýstir undir einum, sigur Karla Einarsson, formaður í Arbeiðarafelagnum Hæddini í Saltangará**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*



*Karla Einarsson hevur verið formaður í Arbeiðarafelagnum Hæddini í út við 20 ár. Hon er eisini stjórnarlimur í Føroya Arbeiðarafelag*

**Saltangará:**
Í fleiri ár hava vit sæð, at bæði í góðum og ringum tíðum møta fá fólk á aðalfundi hjá arbeiðarafeløgum kring landið. Hetta hevur verið ein afturvendandi trupulleiki, sum feløg hava valt at loysa á tann hátt, at tey lýsa til aðalfundar og eykaaðalfundar undir einum.

Hóast Arbeiðarafelagið Hæddin í Saltangará hevur fleiri enn 600 limir, var aðalfundurin seinasta vikuskiftið ikki viðtøkuførur. Beint eftir aðalfundin, var eykaaðalfundur, sum syrgdi fyri, at neyðugu avgerðirnar kundu takast.

### Ikki í nevnd

Karla Einarsson, sum hevur verið formaður í Hæddini í út við 20 ár og er stjórnarlimur í Føroya Arbeiðarafelag, harmast um, at so fá fólk møta á fundi.

– Vit kunnu spyrja, hví hetta er so – og hevur verið soleiðis leingi, bæði í góðum og ringum tíðum.

Hon sigur, at ein orsøkin kanska er, at fólk ikki vilja veljast í nevnd og tí ikki møta á fundi.

– Men hetta er ikki so. Lógir felagsins siga nevniliga, at limirnir hava skyldu til at taka við ábyrgd, um heitt verður á tey. Tú kanst líka so væl verða vald/ur í nevnd, um tú situr heima, sum tá ið tú ert á fundi. Ert tú á fundi, kanst tú greiða frá, hví tú møguliga ikki ynskir at taka við nevndarvali, men situr tú heima, er sami møguleiki ikki til steðar, sigur Karla.

Hon dugir annars ikki at siga, hví áhugin fyri aðalfundunum hjá arbeiðarafeløgunum er so lítil.

– Men hetta er ógvuliga keðiligt, og torført er at siga, hvussu málið kann loysast, soleiðis at fleiri fólk møta til fundar.

### Vald beinleiðis

Í nevndini í Arbeiðarafelagnum Hæddini sita 10 nevndarlimir og tveir eykalimir. Tær stóru bygdirnar í Runavíkar kommunu hava tveir nevndarlimir hvør; tær smáu ein.

Søldarfjørður hevur sítt egna felag, Klett, sum bæði fevnir um kvinnur og menn.

Hæddin hevur eisini limir úr øðrum bygdum, eitt nú Funningi, sum ikki hevur sítt egna felag.

Formaðurin í Hæddini er valdur fyri tvey ár, og sama er við hinum nevndarlimunum.

Bæði formaður og næstformaður verða valdir beinleiðis á aðalfundi.

### Nýggj andlit

Karla stóð ikki fyri vali hesaferð, men tað gjørdi næstformaðurin, Birgir Streymoy. Hann ynskti ikki afturval sum næstformaður, men hevði einki ímóti at vera verandi í nevndini. Nýggjur næstformaður er Sjúrður Jensen.

Lina Højgaard, sum hevur sitið í nevndini í mong ár, ynskti ikki afturval. Valdemar Olsen, Saltangará, Hanna Joensen og Lis Højgaard, báðar úr Rytuvík, eru nýggj í nevndini.

Dan Højgaard og Tummas Olsen, báðir úr Rytuvík, vóru við í gomlu nevndini.

Nýggja nevndin í Arbeiðarafelagnum Hæddini sær nú soleiðis út: Karla Einarsson, Rytuvík, formaður, Sjúrður Jensen, Runavík, næstformaður, Birgir Streymoy og Maiken Lamhauge, Glyvrar, Hervør Djurhuus og Valdemar Olsen, Saltangará, Stig Davidsen, Runavík, Maud Túgvustein, Æðuvík, Hanna Joensen og Lis Højgaard, Rytuvík.

Eykalimir eru Hansy Jacobsen, Glyvrar og Rúni Lamhauge, Rytuvík.

# Íslendskir fiskimenn fiska tvífalt so nógv sum teir norsku

**Veiðivirðið hjá einum íslendskum fiskimanni er eisini 35% størri enn hjá einum norskum fiskimanni**

NOREG/ÍSLAND
*Vilmund Jacobsen*



*Orsøkin til stóra munin millum veiðinøgd og veiðivirði hjá íslendskum og norskum fiskimonnum er helst, at flotin er ymiskt samansettur*

Ein íslendskur fiskimaður fiskar í miðal tvífalt so nógv, sum ein fiskimaður í Noregi. Veiðivirðið av tí, sum íslendski fiskimaðurin fiskar, er í miðal eisini 35% størri, enn hjá einum norskum fiskimanni.

Tað er íslendska fiskivinnublaðið, Fiskifréttir, sum hevur kannað hesi viðurskifti og er komið til hesa niðurstøðu.

Norsku fiskimenninir eru 14.000 í tali; teir íslendsku eru 6.000.

Miðal veiðivirðið hjá einum norskum fiskimanni í fjør var 780.000 norskar krónur. Tølini eru úr norska fiskivinnublaðnum, Fiskaren. Sambært íslendska blaðnum er miðal veiðivirðið hjá einum íslendskum fiskimanni 1,1 miljónir norskar krónur.

Veiðan hjá einum norskum fiskimanni í 2001 var í miðal 192 tons; í Íslandi sama ár var talið 331 tons.

### Samansetingin

Íslendskir serfrøðingar á økinum halda, at tann stóri munurin kemst av, at Noreg hevur ein stóran útróðrarflota, sum gevur nógvum monnum arbeiði.

Strongu reglurnar um samanlegging av kvotum gera, at talið av skipum og bátum í Noregi er so stórt.

# Als eingir trupulleikar av útlendsku arbeiðsmegini

**- Eg havi ta fatan, at útlendingarnir, sum arbeiða og búgva her í økinum, trívast væl, sigur Karla Einarsson**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*

**Saltangará:**
Bæði í Runavíkar kommunu og Nes kommunu er nógv arbeiði, ikki minst nógv tímalønt fiskaarbeiði. Virkini eru mong í tali, og bæði á Toftum og í Saltangará eru landingarmiðstøðir sum gera, at fiskurin er lætt atkomiligur hjá teimum, sum hava hug at keypa fisk til útflutnings ella virkingar.

Karla Einarsson, formaður í Arbeiðarafelagnum Hæddini, sigur, at fáir av hennara limum eru arbeiðsleysir.

– Heldur er tað soleiðis, at her er meira arbeiði enn til okkara limir, sigur hon.

Karla vísir á, at nakrir av hennara limum arbeiða aðrastaðni, eitt nú á Toftum, og limir úr øðrum feløgum arbeiða eisini í Runavíkar kommunu.

### Útlendingar

– Talið av útlendingum, sum arbeiða í Runavíkarøkinum og eru limir í Hæddini, er heldur ikki so lítið.

Hon torir tó einki tal at hála burtur úr skjúrtuermuni.

Spurd, hvussu hesi fólk roynast og trívast, letur Karla væl at.

– Vit hava als ongar trupulleikar havt av hesum fólkum, og vit hava skilt, at tey eru røsk og gera sína uppgávu til lýtar, har tey eru.

Karla Einarsson sigur seg hava ta fatan, at útlendingarnir, sum arbeiða og búgva í økinum, trívast væl.

– Nøkur eru fastbúgvandi; onnur koma higar ein part av árinum í samband við ítrótt, sigur formaðurin í Arbeiðarafelagnum Hæddini.